Føroya
SOSIAL-DEMOKRATUR

Bladstjóri
P. KARBECK MOURITSEN

Prent:
A. ØSTER

Rygg móti rygg!

„Hann má gjalda, ið vil valda,' tað er sjálvsagt. Og sjálvandi kostar tað ikki einki at stjórna einum landi.

Men at gamla sjálvstýrið skuldi fara at verða sambandsins sterkasta verja, tað mundi fáur hava hugsað sær; tó, sjón gongur fyri sögn: Gl. sjálvstýri ber í bötuflaka fyri tey uppskot, sambandið og fólkaflokkurin hava sett fram og samtykt á tingi í ár, uppskot ið leggja meira toll á fólkið.

„Tey valögn, ið verða krökt uppá eina javnaðarvallínu, kunnu eisini vera tey mest ótrúligu," heldur Tingakrossur.

At Tingakrossur ikki sær annað enn valpropaganda í teim uppskotum, javnaðarmenn hava sett fram á tingi fyri at verja tey, ið tær lægstu inntökurnar hava, móti at bera tær tyngstu byrðirnar í samfelagnum — ja, tað merkir menninar, ið standa aftanfyri tað blaðið. Tað er nú einaferð uppgáva javnaðarflokksins at royna at böta um kor teirra, ið tær minstu inntökurnar hava. At Gl. sjálvstýri stevnir móti öðrum málum, skulu vit ikki siga teir illar fyri; men at teir rygg móti ryggi við sambandið skulu verja eina stöðu, har tær tyngstu byrðirnar verða lagdar á teir veikastu herðarnar, tað mátti verið beiskur kostur at svölgt.

Hövdu javnaðarmenn eingi uppskot havt, ið veitt kundu tinginum tann pening, tí krevst, ja, so var heldur ikki stórt at sagt til, at Gl. sjálvstýri eingi ráð visti sær uttan at dottið í tann partin, sum legði stein oman á byrðu á teir herðar, ið ikki eru mentir at bera hesar byrðir. Men so var ikki, javnaðarflokkurin hevði fullgóð uppskot, ið hövdu tikið peningin haðani hann var at fáa.

Nei, javnaðarmanna uppskot vóru bygd á veruleikar; men tað kann henda, at Tingakrossur kemur at ásanna, at tær lógarsamtyktir, sum hann nú verjir saman við sambandinum, koma at vísa seg, sum hann sjálvur sigur um hinar, at „hava tann veikleika at vera sveimandi og í mongum förum meira í loftinum enn á jörðini."

*

Skemt.

Formaðurin: Og hoyr so, skrivarin. So skalt tú skriva: »25 kassar av sprutti, 14 kassar av bayarum og ein sodavatn til Dia.

Óregluligt val?

Á fundi í Havnar arbeiðsmannafelag 28. februar varð stjórnarvalið, ið fór fram 2 mánaðar frammanundan, sagt at vera farið óregluliga fram. Ein nevnd varð sett at kanna spurningin, og í kvöld verður fundur í felagnum, har kanningarnevndin leggur fram tað úrslit, hon er komin til, og so verður möguligt nýtt val av stjórn.

Ja, ofta gongur stórur roykur av lítlum brandi!

Goymið silkihattin!

Í dag er föðingardagur kongs, og einki er at ivast í, at mangar finar frúur í Tórshavnar býi í gjárkvöldið sótu og bustaðu silkihattin hjá manninum, ið vanur er at fara til »reception« hjá ríkisumboðsmanninum henda dag. — Men gakk! So mátti ríkisumboðsmaðurin fara á flóg til Köbenhavn »i tjenstlig anledning«, og so varð »receptionen aflyst« — og frúurnar máttu so goyma silkihattin í vón um betri eydnu næstu ferð.

HAVNAR ARBEIÐSMANNAFELAG

hevur framhald av aðalfundi, *leygardagin 11. mars kl. 8* í Tórshöll.

DAGSSKRÁ:

1. Kanningarnevndin greiður frá úrslitinum.
2. Möguligt nýval av nevnd og og öðrum álitisstörvum.
3. Lógbroytan.
4. Ymist.

Nevndin.

Eftir miðjan mánaðin eri eg aftur til reiðar við byggiarbeiði.

Cl. Dalsgaard.

ANTIKRIST ER KOMMET

Hvem er han? Hvor er han?

Hvilke tydelige bibelske kjennetegn er det som avslører ham og setter oss istand til med sikkerhet å vite hvem han er?

Pastor *Joh. A. Tillgren* taler over dette emne i Losjesalen Sønd. kl. 18 (6).

Alle er velkommen!

TIRSDAG KL. 20, Emne:

Antikrist erobrer hele Kristenheden.

Når? Nu? Hvorledes?

LICITATION

Timburarbeiði til köliverk at sær og málaraarbeiði at sær við Tórshavnar nýggja el-verk verður her boðið fram at gera sambart tekningar, treytur og frágreiðingar, sum fáast til láns hjá H. C. W-Tórgarð, arkitekti, M. D. A.

Boð verða send Tórshavnar elektricitetsverki í seinasta lagi friggjadagin t. 24. mars 1950 kl. 14 og verða tá opnaði í hjáverðu teirra, sum boðið hava.

Elektricitetsnevnd Tórshavnar býráðs.

KUNNGERÐ FRÁ VALUTAMIÐSTØÐINI

Allir teir, ið ynskja at flyta inn úr Bretlandi

persónvognar,
lastvognar og
vöruvognar,

mugu senda umsókn um hetta til Valutamiðstöðina áðrenn 13. mars 1950.

Umsóknir, ið ikki eru Valutamiðstöðini í hendi áðurnevnda dag, kunna ikki væntast at verða tiknar til viðgerðar.

VALUTAMIÐSTÖÐIN, tann 2. mars 1950.
E. h.
J Nicolaisen.

Afturlatingartíðir

Vit hava nú roynt week-end í januar og februar, men av tí at ein handil her í Havn ikki hevur viljað givið seg undir felagssamtyktina, verða nú afturlatingartíðirnar broyttar til kl. 7 friggjadag, kl. 6 leygardag og kl. 5 hinar dagarnar.

Henda skipan verður í gildi til ársaðalfund felagsins tann 10. apríl, tá tann endaliga avgerðin verður tikin hesum máli viðvikjandi.

Havnar Detailhandlarafelag

Skipafelagið Føroyar

Telefonir 209 171 274

Tórshavn

NORTH ATLANTIC SALT CO. A/S

Nr. 1 salt á goymslu.

Útskipan: 50—80 tons um tíman til fiskiför.

Kr. 105/— ton **leverað fritt umborð.**

telgr. adr.: NORTHSALT, Tvöroyri. Tlf. 24 & 78.